ðari úrtøku

Mynd: Jens Kristian Vang

Jacobsen gjørdist meiri álopskendur miðvallari, og B36 megnaði ikki at byrgja fyri so frammarlaga, sum teir høvdu gjørt tað í 1. hálvleiki.

Skála hevði onkrar møguleikar, men teir vóru ikki so stórir. Næst við at fáa mál vóru teir, tá ið annars tryggi Jákup Mikkelsen misti bóltin afturum seg, men lukkutíð fyri hann og B36, so trillaði bólturin út til horna.

Skála málið kom eftir óneyðugt fríspark heilt úti í vinstra verjuborði hjá B36. Fróði Benjaminsen tiltuskaði sær gult kort fyri at halda, Iulian Florescu sendi forargiliga innskrúvandi sending í brotsteigin, og tá ið Bogi Gregersen stakk seg fram og tóktist ætla at broyta kósina á bóltinum, so sigldi bólturin víðari í handara síðu av málinum. Bogi snittaði, men tað var ikki meiri enn tað.

B36 løtan

B36 tóktist eitt vet skelkað, men tað var oddaliði verdugt, at teir megnaðu so skjótt at vinna seg aftur. Óbi, sum ikki átti pláss millum teir fyrstu ellivu hesaferð, varð settur undir liðina á Allani Mørkøre, innskifti Levi Hannsen gjørdist eisini álopsspælari, og Fróði Benjaminsen slepti onkra ferðina í verjuni og fór framvið, og síðstu tjúgu minuttirnar var tað størri tyngd í gestunum, sum fluttu seg longri fram á vøllin.

B36 hevði onkrar skotroyndir, men tað var bara eina ferð, at teir høvdu upplagdan møguleika, og spurningurin er, um tað yvirhøvur var upplagdur møguleiki, tá ið Allan Mørkøre úr spískum í vinstru og við vinstra beini sendi flatt í kassan. Skála málverjin var komin út ímóti, men hann tóktist hava mist orienteringina, tí málið var víðopið, og Allan legði bóltin mitt í málið.

Uppspælið til málið var long sending fram, eftir at B36 hevði vunnið bóltin frá skálamonnum, sum høvdu nógv fólk frammi. Innskifti Bárður H. Joensen vann bóltin, dróg til høgru og sendi diagonalt og langt og neyvt til Allan Mørkøre, sum dugdi væl at gera seg breiðan og at halda mótstøðumenninar burtur, so hann fekk frið og náðir at smekka í málið.

So var tað B36, sum tóktist hava fingið blóð á tonna, og teir vóru framvið fyri at fáa sigursmálið. Men hvørgin parturin megnaði at spæla seg til upplagdar møguleikar, og so fóru allir partar nøgdir út aftur í summarveðrið.

Fakta um dystin

Skála-B36 1-1 (0-0)
1-0: Bogi Gregersen 67.
1-1: Allan Mørkøre 81.
Dómari: Suni Johansen
Skála: Vlada Filipovic – Bárður Danielsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Iulian Florescu – Bogi Gregersen (Rói Jacobsen, 83.), Pætur Dam Jacobsen, Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic, Hanus Thorleifsson (Sveinur Justinussen, 86.) - Jónhard Frederiksberg,
Gult kort: Iulian Florescu, Milan Curcic
B36: Jákup Mikkelsen – Kenneth Jacobsen, Pól Thorsteinsson (Bárður H. Joensen, 46.), Herbert í Lon Jacobsen, Alex Santos – Bergur Midjord, Ingi Højsted (Levi Hannsen, 46.), Klæmint Matras, Fróði Benjaminsen, Eyðun Højgaard (Obele Okeke Onyebuchi, 70.) – Allan Mørkøre
Gult kort: Fróði Benjaminsen

B36 dúvaði upp á síðstu løtuna

Sigfríður Clementsen var ikki ovfarin av, at tað síðstu løtuna eydnaðist hansara monnum at vera omaná, og hann heldur seg ikki kunna vera annað enn væl nøgdan

B36
Jóannes Hansen

B36 venjarin, Sigfríður Clementsen, var væl nøgdur við tað, hansara menn høvdu avrikað á Skála, og hann var væl nøgdur við úrslitið.

– Vit vunnu eitt stig, og tað høvdu vit uppiborið. Teir høvdu onkran góðan málmøguleika, og Jákup mundi spælt okkum eitt puss, tá ið hann misti bóltin. Men teir fáa mál upp á óneyðugt fríspark hjá okkum, og tað var spell, tí vit høvdu tosað um, at teir eru vandamiklir í deyðbóltsstøðum.

Tit vóru varnir í útgangsstøðuni?

– Vit vóru greiðir yvir, at teir vóru moyrari enn vit, tí teir høvdu spælt hósdagin í síðstu viku, tá ið vit høvdu frí. Vit roknaðu við, at vit fóru at hava meiri orku til seinna partin av 2. hálvleiki, og soleiðis varð tað. Eg vænti, at vit høvdu verið førir fyri at skora hatta málið undir øllum umstøðum, og tað vil siga eisini, um teir ikki høvdu havt fingið mál.

– Harafturat skal leggjast, at vit vóru ógvuliga skerdir á miðvøllinum. Eftir steðgin mistu vit Inga Højsted, sum so at siga ikki ger mistøk, og Fróði noyddist eisini av miðvøllinum. Hetta rakti serliga meint, tá ið Mikkjal Thomassen ikki var við, tí hann var leikbannaður.

Hvussu verður við skaddu spælarnum?

– Eg veit ikki heilt. Vit mugu bíða og síggja, hvussu tað fer at taka seg upp. Ingi Højsted er plágaður av sama lítla vøddaskaða, sum ofta argaði, tá ið hann var í Arsenal, og tað er ikki greitt, um skaðin hjá Pól Thorsteinsson er vøddaskaði, ella um tað hevur við sjálvan liðin at gera, sigur Sigfríður Clementsen.